# ítróttur

Nr. 134 • fríggjadagur • 18. juli 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo

HB – FBK Kaunas 0-1 (0-0)

## HB tók ikki møguleikan



*Rúni Nolsøe, sum rann nógv á miðvøllinum hjá HB, verður steðgaður av Marius Bezykornovas frá FBK Kaunas. HB tapti fyrra dystin ímóti litavisku meistarunum, og møguleikin fyri at koma víðari er nú sera lítil*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Føroysku meistararnir høvdu góðar fortreytir fyri at fáa eitt gott úrslit ímóti litavisku meistarunum FBK Kaunas, men útiliðið fór við einum 1-0 sigri**

CHAMPIONS LEAGUE
*Stefan í Skorini*

Tað var við góðum treysti, at reyða og svarta havnarliðið fór undir fyrra dystin í fyrsta undanumfarinum til Champions League. FBK Kaunas sá á ongan hátt ræðandi út, og tí sá HB sær ein møguleika at tryggja sær eitt gott útgangsstøði til seinna dystin.

Men hóast FBK Kaunas er eitt tað veikasta meistaraliðið, sum føroysk lið hava møtt, so fekk HB einki burturúr. Kaunas fekk nevniliga einasta málið í dystinum, tá fimtan minuttir vóru eftir á urinum.

HB hevði annars fleiri atsóknir ímóti Kaunas málinum enn mótstøðuliðið í einum dysti við fáum veruligum málmøguleikum annars. Tí var tað við ringum smakki í munninum, at havnarliðið mátti taka til takkar við einum tapi, og dreymurin um at sleppa víðari er brostin.

### Royndirnar

Tað var týðuligt, at HB-venjarin Frank Skytte ætlaði sær at dúva uppá teir royndu menninar í hópinum. Bert tríggir leikarar, sum byrjaðu inni, vóru yngri enn 27 ár, so at allir leikararnir hjá HB høvdu roynt slíkt áður. Tó skal nevnast, at allir leikararnir, sum sótu á beinkinum, vóru yngri enn 23 ár.

HB stóð seg eisini væl gjøgnum dystin, men hepni og neyvleikin í avgerandi løtunum var ikki til staðar.

Tað var annars FBK Kaunas, sum fekk fyrsta málmøguleikan, tá Martin Christensen framdi eitt fríspark beint uttanfyri brotsteigin. Skotið hjá litaviska leikaranum fór tó beint í múrin.

Tá tíggju minuttir vóru farnir var Andrew av Fløtum um reppið at leggja HB framum. Hans á Lag sendi innfyri úr vinstru til Andrew, men málverjin var skjótur út og fekk hondina á bóltin júst í tí løtu, tá Andrew skuldi seta høvdið á bóltin. Kaunas verjan fekk síðani ruddað tann leysa bóltin burtur av vandaleið.

### Kaunas verjan stóð stinn

HB stóð seg væl fyrstu løtuna, men miðverjan hjá Kaunas var stinn. Serliga legði tú merki til Darius Gvildys, sum var eitt fjall í verjuni.

Símun Eliasen hevði ta næstu royndina hjá HB. Rógvi Jacobsen var hægstur við aftaru stong og skallaði eitt hornaspark inn fyri málið aftur. Har royndi Símun Eliasen seg við einum frekum saksasparki, sum tó fór framvið málinum.

Kaunas hevði eisini onkra roynd fyri steðgin, og slovakin Milan Pastva fekk ein góðan møguleika, tá hann ótarnaður slapp at seta høvdið á eitt innlegg, men eingin megi var í høvdaranum.

Karsten From lá í høgra borði, og hann fekk onkuntíð høvi at nýta sína ferð niðaneftir vøllinum. Ta einu ferðina sendir Rúni Nolsøe danan avstað, og hann sendir innfyri til Andrew, men enn einaferð fær ein verjuleikari høvdið á bóltin í síðstu løtu.

### Lág ferð

Tað sást á øllum brøgdum, at HB hevði ilt við at seta ferð á, tá álop skuldu setast í verk. Tað gekk mangan ov seint fyri seg, tá bólturin varð fluttur frameftir vøllinum. Undirlagið hevði sjálvandi nakað við hetta at gera, og tað darvaði álopsspælinum nógv.

Karsten From, sum óivað var fegin um at spæla á grasi aftur, var kanska tann vandamiklasti leikarin hjá HB. Stutt eftir steðgin fór hann enn einaferð avstað í høgru síðu. Hann fór framvið einum leikara og skuldi síðani leggja innfyri til Andrew av Fløtum, men høgri bakkur hjá Kaunas kom væl aftur og koyrdi bóltin út til horna.

Tað tóktist sum at Kaunas-leikararnir vóru eitt sindur kroystir ta fyrstu løtuna av seinna hálvleiki, men tað eydnaðist ongantíð hjá HB at spæla seg fram til opnar málmøguleikar.

### Málið

Men so fekk HB mønustingin, tá eitt korter var eftir. Toppskjúttin hjá Kaunas Martin Opic, sum av ókendum orsøkum byrjaði á beinkinum, varð settur á vøllin, og hann gjørdi beinanvegin vart við seg.

Hallur Danielsen nýtti hondina at steðga bóltinum úti í høgru síðu, og tað gav Kaunas eitt fríspark, sum Martin Opic ótarnaður slapp at høvda í netið uttan møguleika hjá Bárði Johannesen at bjarga.

Málið setti eitt sindur av lívi í HB-leikararnar, og í tí næsta álopinum royndi Andrew seg við einum frekum skoti langt úti frá. Hann sneiddi fyrst ein verjuleikara av, varnaðist at málverjin stóð nakrar metrar frá málinum og langaði so til, men málverjin fekk nevarnar á bóltin.

Nicu Dogaru fekk óivað tann størsta málmøguleikan hjá HB í øllum dystinum. Hans á Lag vann ein luftbólt við handaru stong eftir hornaspark og legði inn til Nicu, sum stóð púra leysur á málteiginum, men skotið fór langt omanfyri málið.

Móti endanum fekk Andrius Gedgaudas tað reyða kortið, tá hann fekk sítt næsta gula kort, men HB megnaði ikki at fáa útjavnandi málið.

Kaunas hevði hinvegin nærum einki at bjóða uppá frameftir vøllinum, og teir tóktust nøgdir við ein javnleik frá byrjan av, men tað eydnaðist teimum tó at fáa vinnandi málið.

Í dag fór hópurin til Danmarkar á stutta venjingarlegu, áðrenn teir leggja leiðina til Litava, har HB kann vænta at møta einum nógv sterkari liði, tá spælt verður í Kaunas komandi mikudag.

**HB – FBK Kaunas 0-1 (0-0)**

Mikukvøldið 16. juli 2003 kl. 19.00

Á Tórsvølli
Áskoðarar 600

**Dómarabólkur úr Ukreina:** Igor Ischenko, Anatoliy Oliynyk, Oleksandr Bilorus og Vitaliy Godulyan

**UEFA eygleiðari úr Noregi:** Svein Johannesen

**Dómaraeygleiðari úr Týsklandi:** Eugen Strigel

0-1: Martin Opic, 75.

**HB:** 1. Bárður Johannesen - 18. Hallur Danielsen, 11. Jan C. Dam, 15. Símun Eliasen, 5. Hans á Lag - 7. Rúni Nolsøe, 2. Martin Christensen, 6. Nicu Dogaru (12. Tór-Ingar Akselsen, 76.) - 9. Karsten From (12. Páll M. Joensen, 87.), 10. Andrew av Fløtum, 8. Rógvi Jacobsen

**Á beinkinum uttan at verða skiftir inn:** 21. Poul Næs Joensen, 3. Eli Thorsteinsson, 4. Janus M. Joensen, 16. Bjarni Jørgensen, 17. Rókur av Fløtum Jespersen

**Gult kort:** Karsten From 24., Rúni Nolsøe 51., Hallur Danielsen 74.

**Venjari:** Frank Skytte

**Hjálparvenjari:** Oddbjørn Joensen og Sámal Hansen

**Liðleiðari:** Sigurð Hansen

**Fysioterapeutur:** Klæmint Isaksen

**FBK Kaunas:** 12. Gytis Padimanskas - 5. Tomas Kancelskis, 3. Darius Gvildys, 14. Darius Regelskis, Irmantas Zelmikas - 16. Andrius Gedgaudas, 6. Milan Pastva (13. Andrius Puotkalis, 80.), 9. Marius Bezykornovas (17. Andrius Velicka, 84.), 19. Gintas Sirmelis, 27. Giedrus Barevicius - 26. Martynas Karalius (11. Martin Opic, 71.)

**Á beinkinum uttan at verða skiftir inn:** 1. Modestas Stonys, 15. Tadas Papeckys, 23. Dainius Kunevicius, 24. Ricardas Beniusis

**Gult kort:** Darius Regelskis 90.

**Reytt kort:** Andrius Gedgaudas (tvey gul kort)

**Venjari:** Sergej Barovkij

**Hjálparvenjari:** Romas Rudzevicius og Arturas Ramoska



Statoil Kring Føroyar:

## Japp vann ruddiliga

**Tað vóru danskararnir, sum settu dám á prologin í Klaksvík mikukvøldið. Fimm av átta teimum fremstu vóru danir. Gunnar Dahl-Olsen endaði á triðja plássi**



*Gunnar Dahl-Olsen var tann besti føroyingurin á prologinum í Klaksvík. Hann endaði á einum samlaðum triðja plássi, men hann var ikki nøgdur við avrikið*

*Savnsmynd*

SÚKKLING
*Stefan í Skorini*

Thomas Japp Hansen frá Cycling Gladsaxe vann prologin, sum var fyrsti teinurin í súkklukappingini Statoil Kring Føroyar.

Hann kom á mál við tíðini 13 minuttir og 12 sekund, og hann var ein heilan minutt frammanfyri næsta kappingarneytan, ið var Niels Jakob Thomsen úr sama felagi sum Thomas Japp Hansen.

Hesir báðir súkklararnir koyra báðir í A-bólkinum niðri í Danmark, og tað vístu teir eisini á teininum í Klaksvík, sum var 8 kilometrar til longdar.

Thomas Japp Hansen koyrdi 45,45 kilometrar um tíman, og Niels Jakob Thomsen koyrdi 42,11 kilometrar um tíman í miðal. Niels Jakob er annars hálvur føroyingur, og pápi hansara er ættaður av Hvalba.

### Gunnar fremsti føroyingur

Gunnar Dahl-Olsen var tann fremsti føroyingurin á hesum teininum. Hann kom á mál á triðja plássi við tíðini 14 minuttir og 47 sekund. Hann koyrdi í miðal 40, 59 kilometrar um tíman.

– Eg koyri illa, og tað gekk ikki væl hjá mær. Eg kendi tað beinanvegin á mær, at eg ikki hevði ta neyðugu orkuna til at vinna, sigur Gunnar Dahl Olsen.

Næstu føroyingarnir vóru Sverri Mohr Edvinsson og Eli Christiansen. Hesir báðir, saman við Gunnari, verða mettir at vera teir einastu føroysku súkklararnir, sum kunnu gera seg galdandi í hesi kappingini.

Sum heild kunnu teir vera hampuliga nøgdir við úrslitið, tí súkklararnir, sum vóru frammanfyri, eru antin A ella B súkklarar.

### Eysturoyggin

Í gjárkvøldið var tann fyrsti veruligi teinurin súkklaður í Eysturoynni. Hetta er tann harðasti teinurin í kappingini, og hann er 144 kilometrar.

Byrjað verður í Havn og súkklað verður ígjøgnum Kaldbakstunnilin til Eiðis. Farið verður síðani um Eiðisskarð og súkklað verður til Leirvíkar, har súkklararnir venda og halda leiðina Runt Agnið, og málið er við Statoil støðina við Saltangará.

Í kvøld verður einkultstartur á 21 kilometrar á Sandoynni. Leygardagin verður súkklað í Suðuroy, og sunnudagin verður endabresturin í Havn.

## Íslendingarnir møttu ikki

**Vánaliga flogsambandið seinastu dagarnar hevði við sær, at teir fýra íslendingarnir, sum skuldu luttaka í Statoil Kring Føroyar, ikki kundu møta til prologin í Klaksvík**

SÚKKLING
*Stefan í Skorini*

Á tíðindafundinum undan Statoil Kring Føroyar kappingini, boðaðu fyriskipararnir frá, at fýra íslendingar skuldu vera við í kappingini.

Men tá prologurin í Klaksvík skuldi byrja mikukvøldið, vóru íslendingarnir ikki møttir upp til kappingina. Orsøkin var, at flogfarið úr Íslandi ikki fekk lent í Vágunum til ásettu tíðina.

Teir fýra súkklararnir eru Alfreð Harðarson, Gunnar M. Zoega, Haukur M. Sveinsson og Gunnlaugur Jonasson. Harumframt møttu føroyingarnir Remi Lamhauge og Beinir Rasmussen heldur ikki til startin.

Hetta er sjálvandi keðiligt fyri kappingina, og nú skal støða takast til, hvat gerast skal við hendan trupulleikan.

### Fleiri møguleikar

Fyriskiparin av kappingini, Poul Henrik Poulsen, sigur, at enn er støða ikki tikin til, hvat gerast skal í hesi støðuni, men hann nevnir nakrar møguleikar.

Ein møguleiki er at geva íslendingunum ein fiktiva tíð, sum verður roknað útfrá kappingini í Klaksvík, soleiðis at teir eisini hava ein møguleika í samlaðu kappingini. Fleiri útrokningarhættir eru, og tí skal støða eisini takast til, hvør háttur skal nýtast.

Ein annar møguleiki er als ikki at taka prologin í Klaksvík við í samlaðu kappingini, men at súkklararnir byrja aftur frá 0 á teininum í Eysturoynni, sum var í gjár. Hesum vilja fyriskipararnir helst sleppa undan. Støða skuldi takast til málið seinnapartin hósdagin.

## Úrslit av Statoil Kring Føroyar 1. teinur

| Nr. | RyggNr. | Navn | Felag | Aldur | Bólkur | Tíð | Km/t |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | 28 | Thomas Japp Hansen | Cycling Gladsaxe | 22 | A | 00:13:12 | 45,45 |
| 2 | 29 | Niels Jakob Thomsen | Cycling Gladsaxe | 25 | A | 00:14:15 | 42,11 |
| 3 | 27 | Gunnar D. Olsen | Tórshavnar Súkklufelag | 38 | H30 | 00:14:47 | 40,59 |
| 4 | 33 | Ivan Kristensen | Cycling Gladsaxe | 33 | B | 00:15:11 | 39,52 |
| 5 | 31 | Sverri M. Edvinsson | Tórshavnar Súkklufelag | 37 | C | 00:15:32 | 38,63 |
| 6 | 35 | Gregers Rosdahl | Cycling Gladsaxe | 31 | C | 00:16:01 | 37,46 |
| 7 | 39 | Eli Christiansen | Tórshavnar Súkklufelag | 18 | Junior | 00:16:16 | 36,89 |
| 8 | 42 | Jørgen Green | RCR | 65 | H60 | 00:16:48 | 35,71 |
| 9 | 36 | Jákup Johansen | Esbjerg Cykelsport | 29 | Begynder | 00:17:34 | 34,16 |
| 10 | 41 | Stig Helm Hansen | Cycling Gladsaxe | 38 | Motión | 00:17:43 | 33,87 |
| 11 | 45 | Hans Krosstein | Tórshavnar Súkklufelag | 15 | Junior | 00:17:44 | 33,83 |
| 12 | 44 | Danjal Michaelsen | Tórshavnar Súkklufelag | 16 | Ungdom | 00:18:11 | 33,00 |
| 13 | 40 | Christian Guttesen | Tórshavnar Súkklufelag | 24 | C | 00:18:46 | 31,97 |
| 14 | 43 | Bergur Ingemarsson | Tórshavnar Súkklufelag | 14 | Begynder | 00:18:48 | 31,91 |
| 15 | 38 | Bárður Husgaard | OCK | 28 | Begynder | 00:23:06 | 25,97 |

Ikki gjøgnumført

| | | |
|---|---|---|
| 34 | Beinir Rasmussen | Ikki møttur til start |
| 25 | Gunnar M. Zoega | Ikki møttur til start |
| 30 | Gunnlaugur Jonasson | Ikki møttur til start |
| 26 | Haukur M. Sveinsson | Ikki møttur til start |
| 24 | Alfreð Harðarson | Ikki møttur til start |
| 37 | Remi Lamhauge | Ikki møttur til start |

--------------------------------------------------------------------

Ungdómar
1. Hans Krosstein
2. Danjal Michaelsen
3. Bergur Ingemarsson

## Tíðarætlan Statoil kring Føroyar 2003

**Hósdag 17. juli - Eysturoy**
17.00 Kappingin byrjar
20.00 1 maður framvið Statoilstøðina
20.30 Kappingin endar í Runavík

**Fríggjadag 18. juli 2003 - Sandoy**
18.30 Kappingin byrjar á Sandi
19.35 Kappingin liðug

**Leygardag 19. juli 2003 - Suðuroy**
12.30 Kappingin byrjar
16.30 Kappingin liðug í Vági

**Sunnudag 20. juli 2003 - Streymoy**
14.00 Kappingin byrjar á Eiði
16.30 1. fyrstu ferð í Havn
17.00 Kappingin liðug

Øll málini eru við Statoil støðina á staðnum.